


www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 11 - 2011

# Mæltu Statoil til at selja burturav

Tað kom ikki óvart á serfrøðingar, tá Statoil í morgun boðaði frá, at felagið hevði selt burtur av sínum gass- og oljuleiðum í Norðsjónum. Fyri nøkrum fáum døgum síðani mæltu fleiri greinarar Statoil til at selja. Teir vístu á, at eftir tað seinasta stóra fundið í Norðsjónum hevur felagið so nógv tilfeingi, at orkan stendur ikki mát við uppgávurnar. Tí mæltu teir felagnum til at selja burtur av sínum uppgávum, og í so máta hildu teir Statfjord vera eitt gott sølubоð. Oljugreinarin Hans Henrik Ramm segði við Aftenbladet, at Statoil hevur ov nógv at gera bæði innanlands og uttanlands, og tí átti felagið at sleppa sær av við ognarpartar í olju- og gassleiðum. Hann vísti á, at Statoil er við í nógvum uppgávum á norskum øki, og at í fleiri førum er talan um uppgávur, sum eru lutfalsliga stórar samanborið við tað, sum fæst burturúr. -Her kundi felagið selt burturav, tí onnur feløg standa í røð til at yvirtaka hesar uppgávurnar, segði Hans Henrik Ramm. Professarin Øystein Noreng helt eisini, at tað hevði verið skilagott av Statoil at selt burtur av sínum rættindum á norskum øki, serliga nú felagið økir sítt virksemi aðrastaðni. Eisini hann nevndi Statfjord sum eitt møguligt søluevni. Harafturat vildi hann hava størri margfeldi, og eftir hansara tykki eigur Statoil at rudda slóð fyri tí. -Hava tey hjá Lundin líka góð evni til útbygging og rakstur sum til leiting, kann felagið blíva eitt alternativ í Noregi. Det Norske oljeselskap hevur eisini sínar møguleikar. Tað kundi eisini verið eitt hugskot hjá Statoil at selt burtur av Aldous/Avaldsnes, og myndugleikarnir kundu gjørt sítt til, at vit fingu størri margfeldi í vinnuna, segði Norreng við Aftenbladet í síðstu viku.